

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 08 - 2013

# Stór seismikk-kanning eystan fyri føroyska markið

Norska seismikkfelagið TGS hevur fingið til uppgávu frá fleiri oljufeløgum at fremja eina 3D seismiska kanning skamt frá føroyska markinum. Felagið skal kanna eitt øki uppá 2420 ferkilometrar á Rona Rygginum, sum gongur millum Hetland og føroyska markið. Oljufeløgini, sum hava biðið um kanningina, skulu brúka úrslitið av henni í sambandi við fyrireiking av komandi 28. útbjóðingina í hesum økinum. Sambært heimasíðuni hjá TGS er talan um ta fyrstu 3D kanningina, sum verður gjørd í hesum partinum av tí lovandi Atlantsmótinum. TGS hevur eisini fingið til uppgávu at gera 2D seismikk-kanningar í Newfoundlandi og Labrador.